# Hermundur í Mortanstovu 70 ár

Mánadagin 22. august verður Hermundur Zachariassen á Argjum 70 ár. Hann er sonur Annilenu f. Tausen úr Runavík, og Jákup Zachariassen, í Mortanstovu, í Norðragøtu.

Børnini hava skrivað Hermundi eina heilsan. Her skal sum minst endurtakast av tí, sum tey greiða frá.

Hermundur er ein ímynd av søguni hjá deyvum í Føroyum og skal verða trivið eitt sindur í hetta.

Tey eru sjey systkin, og av hesum eru tey fimm deyv. Hermundur er tann elsti av teimum fimm. Fýra teirra, Hermundur, Marni og tvíburarnir Arnbjørg og Hallbjørg, máttu fara til Danmarkar í deyvaskúla sum børn, meðan tann yngsti, Jan, slapp á specialskúlan í Havn.

Tað eydnaðist nevniliga pápanum at fáa sannført politiska myndugleikan, í Gøtu var hetta Jákup Frederik Øregaard løgtingsmaður í nærum 40 ár, um, at neyðugt var við skúla fyri deyv í Føroyum, og tí slapp Jan undan at fara av landinum.

Tað er ringt at ímynda sær, hvussu stórt brek tað er at vera deyvur. Tað er einki í vegin fyri hjá deyvum at tosa. Men meðan vit onnur læra tað av tí, sum vit hoyra, hava deyv ikki hendan møguleikan. Tí eru tey eisini avmarkað á tí økinum.

Hermundur dugur sera væl at greiða frá, og hann hevur í bókini “Søgan um hini” greitt frá, hvussu hann sum smádrongur upplivdi hetta ikki at hoyra, og hvussu hann hóast alt kundi samskifta. Hannn skrivaði:

”Tá ið eg var lítil, tosaðu foreldur míni við meg á heimagjørdum teknmáli. Tað bar væl til at peika á lutir og persónar, men sjálvandi bar ikki til at gera hugsanir og spurningar á henda hátt. Men vit skiltu tó hvønn annan heilt væl. Nógv av børnunum, sum vit spældu við, dugdu eisini at brúka hetta heimagjørda fingramálið. Eg fór í skúla sum hinir dreingirnir. Eg fekk tó ikki so nógv við, men eg lærdi at skriva stavirnar. Eg minnist so væl, tá ið eg og beiggi mín Marni skuldu til Danmarkar at ganga í skúla. Ein dagin bað pápi meg koma við, so skuldi hann vísa mær havið. Hann peikaði út á havið og segði: “Tú skalt langt, langt út við skipi”. Eg hugdi út yvir havið og hugsaði: ”Tað var løgið, hvat mundi vera har aftanfyri.”

Vit fóru báðir niður í senn. Tann fyrsta dagin fylgdi ein kona okkum til deyvaskúlan í Keypmannahavn. Vit sóu ein heilan hóp av børnum, ið gingu og veipaðu við ørmunum. Vit stóðu púra forfardir og skiltu ikki petti av nøkrum. Men vit fingu so okkara dagligu gongd her og vuksu upp saman við nógvum deyvum.

Seinni vórðu vit fluttir á skúlan í Fredericia.

Tvær ferðir árliga sluppu vit heim til foreldrini, í summar- og jólafrí. Vit gleddu okkum ómetaliga nógv til heimkomurnar, og vit vóru alspentir hvørja ferð. Men sorgin var stór hvørja ferð, vit skuldu avstaðaftur, tá runnu nógv tár.

Tá ið eg var liðugur á skúlanum, gekk eg við posti í heimbygdini eina tíð. Men mamma mátti greiða mær frá, hvør var hvør, tað var eitt rættiligt stríð. Vit gjørdu eitt tekn fyri hvørt fólkið: Ein hevði brillur, ein skeitti, ein var tjúkkur ella klænur, ballaði ella roykti pípu, ein hevði stórt skegg o.s.fr. Skjótt gekk tó til eg visti hvør átti postin.”

Hermundur hevur gjørt nógv fyri at kunna um viðurskiftuni hjá deyvum millum annað í skúlum. Tað verður sagt, at hansara kropsmál og mimikkir eru so livandi, at tað ber til at skilja hann uttan at nýta teknmál.

Vit kennast frá Norðragøtu. Lutvíst eru vit grannar, og so eru vit eisini skyldmenn við felags røtur yvir á Skipanes.

Tað skal sigast, at Mortanstova var eitt einastandandi hús. Omma Hermund var Marin, sum var ein framúr kvinna á mongum økjum. Tað sama var galdandi fyri Zacharias, sum doyði uppá seg ungur, og sum tey fægstu minnast í dag. Eisini kann tað sama sigast um foreldrini hjá Hermundi, sum høvdu eitt sera tætt tilknýti til okkum í Tjørnustovu, og sum vit framvegis minnast við takksemi. Tað verður greitt meira frá teimum í Mortanstovu í komandi Keraldi hjá Fornminnisfelagnum á Glyvrum.

Foreldrini megnaðu á ein framúr hátt at stuðla sínum deyvum børnum, so tey skuldu kunna hava eina so vanliga tilveru sum møguligt.

Hermundur var eitt skifti bakari í Gøtu, og tá plagdi eg at hjálpa teimum við bókhaldinum. Hetta hevur styrkt kennskapin okkara millum.

Hermundur er tann einasti av teimum deyvu í Mortanstovu, sum býr í Føroyum. Hann er í heila tikið ein av teimum elstu deyvu føroyingunum, sum hevur valt at verða í Føroyum. Hilmar Heinesen er eldri, nærkast teimum 100, og teir báðir hava verið ein góð eggjan til ung deyv til at verða verandi í Føroyum, hóast lívið kanska hevði verið lættari í Danmark.

Hermundur fekk nevniliga eina so óføra konu, Sólbjørg Mortensen av Argjum. Hon hevur verið hansara fremsta samband við umheimin sum tulkur. Børnini hava seinni eisini tikið við. Men nú er eisini ein væl útbygd almenn tolkatænasta, sum lættir nógv um hjá teimum avvarðandi. Tað sama er við tøkni, her nógv er hent við alnót og tílíkum.

Hesi framstig hevur Hermundur stuðlað uppundir sum formaður, og eisini sum ein stovnari av Deyvafelagnum í 1972.

Søgan um Hermund er ein lívsjáttandi søga. Hóast skerdur á einum so týdningarmiklum øki, hevur hann víst, at tað ber til at fáa eitt gott lív. Samstundis hevur hann skapt sær stóra virðing millum fólk.

Tey bæði eiga fýra børn, Ann Mari, Connie, Jan og Petur. Abbabørnini eru 10 í tali.

Góði Hermundur. Hjartaliga tillukku við teimum 70 árunum!

**Óli í Tjørnustovu**



*Sólbjørg og Hermundur*

# Heilsan frá børnum við familjum

Vit vilja nýta høvi á henda hátt, at ynskja pápa, verpápa og abba okkara hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

Babba var 2 ára gamal, tá lagt varð til merkis at hann einki hoyrdi. Við heimagjørdum teknmáli royndu tey at samskifta, og 8 ára gamal, varð hann noyddur at fara til Danmarkar á Deyvaskúla.

Hann fekk fosturforeldur í Fredericia, men kom hvørt summar heim til familjuna í Gøtu at ferðast.

Eftir lokna skúlagongd, fór hann í læru sum bakari, og kom aftur til Føroyar sum ein ungur maður. Hann fekk arbeiði hjá Frants Restorff. Skjótt bleiv hann forelskaður í damu av Argjum, og í 1961 blivu tey gift. Tey bygdu hús á Argjum, og fingu 4 børn.

Tað sá kanska ikki so ljóst út fyri henda lítla deyva drongin, men tá vit hyggja eftir honum í dag, so er tað ikki smávegis hann hevur fingið burtur úr lívinum. Hann hevur ikki tíð at keða seg. Tað verið seg fótbóltur, ella ein túr til Leynavatn við tráðuni. Vit hava ikki tal á øllum málningunum hann hevur málað. So í telduna, har hann hevur samband við tey deyvu gjøgnum web-camera. Á tekst-varpinum fylgir hann við øllum sum hendir úti í heimi. Ja – sanniliga ein maður sum hevur mót uppá lívið.

Fleiri munnu vera, sum hava hitt hann í Málingahandlinum, tá nýggjar gardinur skulu keypast, ella lakk skal blandast til bilin.

Vit minnast aftur við gleði á løturnar, tá babba bygdi kassabilar og “hyttu” og gjørdi drekar til okkara. Stuttligt var tá vit skuldu uttanlands at ferðast. Nógvir km eru koyrdir í Danmark, Norra, Onglandi, ja heilt til Jugoslavia. Spennandi var at vera í Tivoli og í Legolandi.

Allarbest var tó at vera heima hjá okkum. Húsið var altíð fult av fólki, og tónleikurin rungaði.

Ikki hoyrdi hann trummurnar og bassguitaran á loftinum, men altíð gleddist hann saman við okkum um tað.

Vit vilja takka babba og mammu fyri eitt gott og trygt heim á Argjum. Takk fyri tykkara kærleika og fyri tykkara bønir fyri okkum og okkara børnum.

Vit elska tykkum, og ynskja tykkum nógv góð ár framyvir.

Hevur tú hug at heilsa uppá føðingardagsbarnið, ert tú vælkomin í Deyvahúsið í Havn leygardagin

18. august frá kl. 10 til 14

**Børnini við fam.**

# Dagurin

18. august. Agapetus. Deyður umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

19. august. Sebaldus. Sigst at hava verið guðrøkin danskur kongssonur, sum var trúlovaður franskari prinsessu. Men hann fór frá henni og gav seg í kleystur í Nürnberg, har hann doyði í hvussu so er fyri ár 1070.

20. august. Bernhard, deyður í 1153. Abbati og kirkjulærari í Fraklandi. Kom upp í munka- og nunnuskipanina, ið róptu seg cisterciensaraskipanin. Har gjørdist hann skjótt oddamaður, og fekk stóran týdning í kirkjupolitikki og kirkjulæru í 12 øld. Bygdi í 1115 kleystrið Clairvaux og varð síðani róptur Bernhard úr Clairvaux. Hann var vanur at taka til: Ora et labora (bið og arbeið). Navnið er germanskt og merkir bjørn og harður.